PhD VERKÆTLAN

**VÆLFERÐ OG FØÐSLA HJÁ ROGNKELSUM Í ALIRINGUM: menna skilabesta føðslutørvin fyri ung rognkelsi, grundað á eina kanning av villum stovnum**



## PhD lestrarstuðul

Hesin PhD lestrarstuðulin verður veittur fyri trý ár. Hann fevnir um at taka royndir frá bæði aldum rognkelsum og frá villum stovnum. Hetta krevur ein eldhugaðan lesandi, ið er sinnaður at arbeiða í hesum umstøðum og at vera leingi í senn í Føroyum, har mesta royndarvirksemið fer fram.

The University of Sterling (IoA) og Fiskaaling í Føroyum vegleiða tann lesandi við verkætlanini. Hin lesandi verður innskrivaður á the University of Stirling og fyrst og fremst staðsettur í deildini fyri aling í tilsamans trý ár.

Allir umsøkjarar skulu í minsta lagi hava eina *upper second class honours degree* ella samsvarandi í lívfrøði, djóralækna ella landbúnaðarfrøði. Ynskiligt er eisini við eini *MSc degree* í eini viðkomandi grein. Skal umsøkjari gera sær góðar vónir um upptøku, er gott við hollari vitan um djóraatferð (serliga um fisk), lívvirkisfrøði og føðslu. Viðkomandi má eisini vera fúsur at arbeiða bæði úti og á alistøðini, á skrivstovu og í starvsstovu.

Lestrarstuðulin er £14.777 (uml. DKK 128.250) um árið. Lestrarvirksemið byrjar væntandi miðskeiðis í 2019.

Umsøkjarar til lestrarstuðulin kunnu seta seg í samband við Dr. Rey (University of Stirling) á teldupost Sonia.reyplanellas@stir.ac.uk ella til Dr. Johannesen (Fiskaaling, Føroyar) á asajoh@fiskaaling.fo. Lívsrensl og umsókn skulu viðfestast.

**Seinasta freist at senda inn umsókn er 28. mars 2019.**

# Annað

**VEGLEIÐARATOYMI**
Dr Rey-Planellas frá Atferðar- og Vælferðargranskingarbólkinum og Dr Betancor frá Føðslu-granskingarbólkinum verða vegleiðarar frá IoA. Dr Johannesen verður vegleiðari frá Fiskaaling.

**STUÐULSKRØV**
Hesin lestrarstuðulin verður latin fyri undirvísingargjald hjá borgarum úr Føroyum, UK ella ES. Umsóknir frá einstaklingum, ið ikki uppfylla hetta kravið, verða tiknar við, um prógvast kann, at tey megna at fíggja munin millum UK/ES kostnaðir og altjóða kostnaðir.

**PERSÓNSUPPLÝSINGAR**

| Førleikar | Grundkrøv | Ynskiligt | Hvussu verða grundkrøv mett (Brúkaralykil) |
|---|---|---|---|
| Útbúgving / førleikar | UK honours degree við 2.1 ella hægri (ella samsvarandi) í viðkomandi grein (t.d. lívfrøði, djóralækni, sálarfrøði) | First class honours degree í viðkomandi grein; viðkomandi Masters. | A |
| Dugnaskapur / evnir | Áhugi fyri at arbeiða við fiski. Evni og virkisfýsni at arbeiða við dátur, starvsstovu og á alistøð. Dugnaligur til vísundaligt samskifti. | Leggja fram fyri vísundaligar og ikki-vísundaligar áhoyrarar. | A / I |
| Royndir | Praktiskt arbeiði við djórum. Greiða úr hondum og miðlan av granskingarverkætlan. | Royndir við at skriva vísundaligar útgávur; førleikar innan hagfrøði | A / I |
| Vitan | Hollar royndir við djóraatferð og lívvirkisfrøði, íðin fyri djóravælferðarfrøði, fatan av fóðurframleiðsluídnaðinum. | Vitan um aling. | A / I |
| Aðrar fortreytir | Smidligur, toymissinnaður, fúsur at ferðast. Koyrikort. | | A/I |

**Brúkaralykil:** **Samrøða I**
**Umsókn A**

---

*The University of Stirling* er eitt av fremstu granskingaruniversitetunum í Bretlandi, við serligari serfrøði í greinum innan fyri mentan og samfelag, heilsu og vælveru, umhvørvi og fólk, fyritakssemi og búskap, og ítrótt. *Deildin fyri Náttúruvísund* varð stovnað í januar 2011 og er eitt samstarv millum deildirnar fyri aling, lívfrøði og umhvørvisvísund, sálarfrøði og telduvísund & støddfrøði.

*Fiskaaling* er ein føroysk granskingarfyritøka innan fyri aling, sum verður lutvíst fíggjað av Føroya landsstýri. Vísundafólk á Fiskaaling hava tætt samband við vísundaliga umhvørvið í Føroyum og við lokalu alifeløgini. Hetta letur upp fyri tvørfakligum samstarvi og *on-farm* gransking. Fiskaaling gagnnýtir granskingarstarvsstovur á iNOVA umframt granskingarstovurnar í Sjódeplinum í Nesvík, sum tilsamans leggja upp til hópin av granskingarmøguleikum.